# Semingsmenn royna at finna semju

**- Partarnir hava ásannað, at ov langt er á mál í lønarspurninginum, og tí eru vit og lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum samd um at lata semingsmenn yvirtaka samráðingarnar, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Starvsmannafelagnum og lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum at semjast um nýggjan sáttmála í samráðingunum, sum verið hava millum partarnar.

- Um 18-tíðina sunnukvøldið ásannaðu bæði vit og lønardeildin, at eingi útlit vóru til semju, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

Hann vísir á, at tað serliga er lønarspurningurin, sum skilir partarnar.

## Knúturin ov stórur

Sagt hevur verið, at Fíggjarmálaráðið krevur eina null-loysn í lønarspurninginum, og at Starvsmannafelagið hinvegin krevur eina reallønarhækking upp á 1,7% um árið.

- Men eg veit ikki, hvaðani fjølmiðlarnir hava hesi tølini, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum annars einki ítøkiligt við siga um knútin millum partarnar.

Hann ásannar kortini, at knúturin er somikið stórur - og ringur at loysa, at neyðugt er hjá pørtunum at lata semingsmenn yvirtaka samráðingarnar.

- Starvsmannafelagið og lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum eru samd um at velja Jógvan Amonsen, grannskoðara og Alfred Petersen, advokat, til semingsmenn, og teir hava játtað at taka hesa uppgávu upp á seg, sigur Gunnleivur.

## Kortini á borðið

Í gjár skuldi fundur vera millum partarnar, har greitt varð frá, hvørjir knútarnir eru .

- Nú verða tað so semingsmenninir, sum seta út í kortið og leggja samráðingarnar til rættis, segði formaðurin í Starvsmannafelagnum sunnukvøldið eftir, at samráðingarnar vóru slitnaða.



*- Knúturin millum partarnar var somikið stórur - og ringur at loysa, at neyðugt er at lata semingsmenninar yvirtaka samráðingarnar, sigur Gunnleivur Dalsgarð*



*Her handar Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag Eiriki á Húsamørk, stjóra á Høvdavirkinum, virðislønina fyri heiðurin sum Ársins Virki 2005*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Tað almenna kann vera kappingaravlagandi

**- Inntøkurnar hjá tí almenna eru skattafíggjaðar. Tí er tað kappingaravlagandi, um tað almenna gongur á odda at hækka lønirnar, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag**

KAPPINGAR-AVLAGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í nýggja bóklinginum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur givið út, verður nomið við tað almenna sum arbeiðsgevara.

- Vit halda, at tað almenna skal lata privatu vinnuna ganga á odda, tá ið løn og sømdir skulu avtalast við arbeiðstakararnar. Hetta er neyðugt, um vinnan skal klára seg.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at um tað almenna gongur á odda, er skjótt, at lønir og sømdir verða størri, enn tað privata kann bera, tí tað almenna hevur ikki somu atlit at taka.

## Avlaging

- Inntøkurnar hjá tí almenna eru skattafíggjaðar, og tí er tað kappingaravlagandi, um tað almenna gongur á odda at hækka lønirnar, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum annars heldur, at tað almenna - eins og vinnan annars - allatíðina eigur at tillaga seg virkseminum í landinum og effektivisera seg.

# Ternan røkti siglingina um Leirvíksfjørð í vikuskiftinum

**Umvælingarnar, sum skuldu gerast á maskinuna á Dúgvuni leygarnáttina, gjørdust drúgvari enn væntað, og tí røkti Ternan siglingina um Leirvíksfjørð í vikuskiftinum**

MASKINBREK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ternan, sum seinastu tíðina hevur ligið á Vestmanna, røkti siglingina um Leirvíksfjørð leygardagin og sunnudagin.

Umborð á Ternuni segði manningin sunnukvøldið, at umvælingar, sum skuldu gerast umborð á Dúgvuni leygarnáttina, gjørdust drúgvari enn væntað.

- Dúgvan kundi tí ikki sigla aftur leygarmorgunin, og tí hevur Ternan røkt farleiðina um Leirvíksfjørð.

Tað er sama manning, sum nú er umborð á Ternuni, ið annars er umborð á Dúgvuni.

Umborð á Ternuni dugdu teir ikki at siga sunnukvøldið, nær Dúgvan verður klár aftur, men tað fer neyvan at taka drúgva tíð.

- Siglingin hevur gingið væl, og í vikuskiftinum hevur Sam eisini tikið ein part av trýstinum, søgdu teir umborð á Ternuni.

Bæði Dúgvan og Ternan taka 32 vanligar persónbilar hvønn túrin. Stórur munur er heldur ikki á ferðafólkatalinum í summartíðini. Dúgvan tekur 352 fólk og Ternan beint yvir 300. Men um veturin kann Ternan bert sigla við 166 fólkum - og tá kann Dúgvan framvegis sigla við sama ferðafólkatali sum um summarið.



*Tað hevur tikið longri tíð enn væntað at umvæla maskinuna á Dúgvuni, og tí kundi hon ikki fara í sigling aftur leygarmorgunin sum ætlað. Ternan røkti í staðin siglingina um Leirvíksfjørð í vikuskiftinum*

# Ótangar gjørdu seg inn á bil

**Leygarnáttina vóru ikki tey nógvu herverkini fram í Havnini - og tó; ein bilur slapp ikki at standa í friði**

HERVERK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri segði vakthavandi á løgreglustøðini í Havn, at býurin var eitt reint "sirkus" í vikuskiftinum.

Náttina fyri, vit tosaðu við vakthavandi, hevði løgreglan rikið fólk av takinum hjá Frants Restorff í miðbýnum - og tíðliga um morgunin hevði løgreglan eisini verið úti í Sandá, har nakrir rúsaðir mans vóru farnir niðan í ánna at svimja.

Í báðum førum spældu hendingarnar tó væl av.

Sambært vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sunnumorgunin, var býurin ikki tað stóra sirkusið síðstu nátt.

Nøkur harðskapsmál vóru, men sum heild fingu bygningar, bilar og annað frið.

Og tó; ikki fingu bilarnir heilt frið kortini, tí ótangar høvdu gjørt seg inn á ein parkeraðan bil í býnum.

- Annars hava vit eingi herverksmál havt í síðstu nátt, sigur vakthavandi í Havn sunnumorgunin.